UTTAN ÚR HEIMI

## 4.000 børn misnýtt

Kanningar í USA hava nú avdúkað, at prestar í at kalla hvørjum einasta biskupadømi hava misnýtt børn kynsliga, og sambært blaðnum The New York Times hava meiri enn 4.000 børn verið fyri kynsligari misnýtslu.

Umleið 1.200 prestar eru nú skuldsettir ella ákærdir fyri at hava misnýtt børn kynsliga. Tey flestu brotsverkini vórðu framd í sjeyti- og áttatiárunum, og nógvir katolikkar halda, at tær stóru sosialu broytingarnar í USA seinast í sekstiárunum gjørdu, at nógvir prestar fóru út um tær reglur og teir siðir, sum høvdu verið vanligir frammanundan.

Frælslyntir amerikanarar halda harafturímóti, at framferðin hjá prestunum kemst av teirri snævurskygdu áskoðanini, sum tann katólska kirkjan hevur til kynslig viðurskifti. Millum annað krevur kirkjan, at allir prestar skulu halda seg frá kynsligum sambandi við hitt kynið.

## Galtieri deyður

Fyrrverandi einaræðisharrin í Argentina, Leopoldo Galtieri, doyði um vikuskiftið 76 ára gamal. Galtieri varð tikin í fjør og skuldsettur fyri at hava ábyrgdina av, at 19 limir í peronistaflokkinum hvurvu og eftir øllum at døma vórðu myrdir í áttatiárunum. Síðani handtøkuna hevur fyrrverandi einaræðisharrin sitið í húsavarðhaldi.

Leopoldo Galtieri var ein av heryvirmonnunum í hernaðarstýrinum, sum stýrdi Argentina í árunum frá 1976 til 1983. Stýrið var sera harðrent og, og hildið verður, at millum 11.000 og 30.000 politiskir andstøðingar vórðu burturfluttir og myrdir, meðan hernaðarstýrið sat.

Í 1986 varð Leopoldo Galtieri dømdur í sambandi við argentinska ósigurin í krígnum við Bretland um Falklandsoyggjarnar. Argentina hersetti oyggjarnar í 1982, men 74 dagar seinni noyddust teir argentinsku hermenninir at geva seg yvir. Kríggið kostaði 652 argentinum og 255 bretum lívið.

## Frysti í hel

Myndugleikarnir í Kanada funnu leygardagin líkið av einum manni í hjólrúminum á einum flogfari í floghavnini í Toronto.

Kanadiska løgreglan sigur, at maðurin hevði fjalt seg í hjólrúminum, áðrenn flogfarið fór úr Dominikanska Lýðveldinum til Toronto. Ein talsmaður hjá løgregluni sigur, at maðurin er um 30 ára aldur, men tað er ikki greitt, hvør hann er, ella hvaðani hann er.

Kanadisku myndugleikarnir siga, at tað hendir meiri enn so, at fólk fjala seg í hjólrúminum á flogførum, sum flúgva til Kanada. Hetta er ein sera vandamikil ferðarháttur, tí tað er sera kalt í hjólrúminum. Nøkur sleppa frá ferðini á lívi, meðan onnur frysta í hel. Herfyri varð líkið av einum manni funnið í hjólrúminum á einum flogfari, sum var komið úr Afrika til Kanada.

## Drotningin tryggjar seg

Bretska blaðið Sunday Times veit at siga, at Elizabeth drotning hevur givið boð um at byggja nøkur serlig trygdarrúm í slottinum Buckingham Palace. Rúmini skulu verja drotningina og kongshúsið ímótui møguligum yvirgangsatsóknum.

Sambært blaðnum skulu rúmini hava 46 sentimetrar tjúkkar stálveggir, ið skulu tola álop við bumbum ella gassi. Veggirnir skulu eisini tola, at eitt flogfar rennir á Buckingham Palace. Í rúmunum verður øll hugsandi trygdar- og samskiftisútgerð og so mikið at mati og øðrum, at drotningin og húski hennara skulu kunna vera har í eina viku ísenn.

Sambært Sunday Times fer hvørt trygdarrúm at kosta 7,5 milliónir krónur.

# Amerikanskur guvernørur broytti 157 deyðadómar

**Tað var einki minni enn ein uppgerð við deyðarevsing, tá George Ryan, guvernørur í statinum Illinois gjørdi av at broyta 157 deyðadómar til lívlangt fongsul.**



*George Ryan, guvernørur hevur við søguligu avgerð síni elvt til orðaskifti í USA um deyðarevsing. Sjálvur sigur hann, at deyðarevsingin í USA er tilvildarlig og rasistisk og hevur einki við rættvísi at gera.*

– Eg veit fullvæl, at onnur fara at gera gjøldur burtur úr avgerð míni at flyta allar fangarnar burtur av deyðagongini, og at fleiri fara at finnast at mær. Men sjálvur eri eg sannførdur um, at eg fari at sova betur um næturnar eftir avgerðina, segði guvernørurin í amerikanska statinum Illinois, George Ryan, aftan á ta søguligu avgerðina leygardagin.

Ryan fór frá sum guvernørur í gjár, og eygleiðarar eru á einum máli um, at avgerð hansara leygardagin fer at elva til nógv orðaskifti í øllum USA. Fríggjadagin lat hann fýra svartar fangar leysar. Teir høvdu tá sitið tólv ár og bíðað eftir at verða avrættaðir, men tað vísti seg, at teir vóru ósekir. Dagin eftir fingu so allir hinir deyðadømdu boð um, at teir verða ikki tiknir av døgum.

Teir fýra, sum vórðu latnir leysir fríggjadagin, høvdu játtað seg sekar, sjálvt um teir vóru ósekir. Tað vísti seg, at teir høvdu verið so illa bukaðir undir avhoyringunum, at teir noyddust at játta seg ekar. Løgreglumaðurin, sum stóð á odda fyri avhoyringunum, fekk seinni sekkin.

### Tilvildarlig revsing

Fyri trimum árum síðani setti George Ryan deyðarevsing úr gildi í Illinois, eftir at fleiri frágreiðingar høvdu avdúkað, at ósekir fangar høvdu fingið deyðadóm. Deyðarevsing kom í gildi í Illinois í 1977, og síðani eru tólv fangar tiknir av døgum, meðan trettan deyðadømdir eru vorðnir fríkendir seinni.

George Ryan hevur alla tíðina verið ímóti deyðarevsing. Hann sigur, at deyðarevsing er tilvildarlig og harafturat rasistisk, og hendan revsing hevur heldur einki við rættvísi at gera, sigur tann fráfarni guvernørurin. Í hesum sambandi vísir hann á, at í fjør vóru umleið 1.000 morð í Illinois, men bara tvey prosent av drápsmonnunum eru dømdir til deyða. Hvat við hinum 98 prosentunum, spyr Ryan og sigur, at hetta vísir, hvussu tilvildarlig deyðarevsingin er.

George Ryan er konservativur republikanari, men í spurninginum um deyðarevsing hevur hann eina aðra áskoðan enn flestu floksfelagarnir. Eftirmaður hansara í guvernørstarvinum, demokraturin Rod Blagojevich, hevur eisini sagt sína hugsan um deyðarevsing, men hann hevur ikki somu áskoðan sum undanmaðurin.

– Eg haldi ikki, at tað er rætt at skera alt yvir ein kamb og at broyta allar deyðadómarnar. Hetta eru hóast alt drápsmenn, sum vit tosa um, sigur maðurin, sum í gjár tók við sum guvernørur.

### Færri deyðadómar

Løgfrøðingar í USA vænta ikki, at aðrir statir fara at gera sum Illinois. Í hvussu er kunnu vit ikki vænta, at teir fara at taka eina so víðfevnda avgerð sum George Ryan. Men tann fráfarni guvernørurin setti seg væl inn í viðurskiftini, áðrenn hann tók avgerðina. Hann kannaði fyrst viðurskiftini hjá hvørjum einasta av teimum deyðadømdu, eins og hann kannaði málini hjá teimum, sum fingu deyðadóm, men sum seinni vórðu fríkendir.

– Eg havi tosað við skyldfólk hjá drápsmonnunum og teimum myrdu seinastu árini, og eg eri komin til ta niðurstøðu, at hetta hevur einki við rættvísi at gera. Talan er heldur um hevnd, har kravt verður, at eitt mist lív skal bøtast við einum øðrum lívi, sigur George Ryan.

Amerikanskir eygleiðarar siga, at talið á brotsmonnum, sum fáa deyðadóm, er minkað í USA hetta seinasta árið, og at avgerðin hjá George Ryan uttan iva fer at stuðla upp undir hesa gongdina. Fyri einum ári síðani sótu 3.600 amerikanskir fangar og bíðaðu eftir at verða avrættaðir, men í seinastuni er talið á deyðadómum minkað.

Í fjør vórðu 71 deyðadómar fullførdir í USA, og deyðarevsing er framvegis galdandi í 38 statum. Nógv teir flestu deyðadómarnir verða kortini fullførdir í teimum báðum statunum Texas og Oklahoma. 66 av teimum 71 avrættingunum í fjør vóru í hesum báðum statunum.

# Bretar og amerikanarar ímóti kríggi við Irak

**Amerikanararnir vilja ikki hava kríggj uttan heimild frá ST, og flestu bretar vilja als ikki hava kríggj við Irak.**

IRAK-KREPPAN

*Árni Joensen:*

Meiningakanningar í Bretlandi og í USA vísa, at tað er so sum so við stríðshuganum, tá tað snýr seg um eitt møguligt kríggj við Irak.

Í USA vísa kanningarnar, at tveir triðingar av teimum spurdu eru ímóti kríggi við Irak, men at 83 prosent taka undir við einum álopi á landið, um ST samtykkir tað. Samstundis vísir sama kanning, at helmingurin av amerikanska fólkinum metir framvegis al-Qaeda sum eina hóttan ímóti USA, men at bara fjórði hvør heldur Irak vera eina hóttan.

Í Bretlandi er mótstøðan ímóti krígsætlanunum uppaftur týðiligari. Har siga 58 prosent beinleiðis nei til eitt kríggj. 53 prosent siga, at tey kunnu taka undir við at leypa á, um ST samtykkir tað, men bert 13 prosent siga, at Bretland eigur at fara í kríggj við USA, sjálvt um ST ikki samtykkir tað.

Kanningin í Bretlandi vísir eisini, at triði hvør breti heldur, at tann veruliga ætlanin hjá amerikansku stjórnini er at fáa ræðið á iraksku oljuni, og bara 21 prosent halda, at tað eru tey iraksku vápnini, sum eru tann veruliga orsøkin til, at USA hóttir við álopi.



